




# Vælferðin er endamálið

**Visjónin um vælferð stendur nakað fyri seg í Visjón 2015, men teir 12 undirbólkarnir eru nú farnir til verka**

VISJÓN 2015
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Startskotið til Visjón 2015 varð loyst av fyri knøppum mánað síðani. Teir 12 strategibólkarnir eru mannaðir og farnir til verka, og tann 13. grundarsteinurin, sum landsstýrið hevur rópt Visjón um Vælferð, er eisini farin til verka. Í 13. grundarsteininum eru 12 undirbólkar, sum arbeiða við vælferðavisjónini.

### Fólksins visjón

Sambært landsstýrinum byggir Visjón 2015 á 12 grundarsteinar, meðan endamálið er 13. grundarsteinurin, nevniliga vælferðin.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum sigur, at grundarsteinurin um vælferð stendur í eini serstøðu í visjónsætlanini.

– Vælferð er ein víðfevnandi og tungur grundarsteinur, samanborin við hinar, og tí verður eisini arbeitt øðrvísi við honum - ikki í einum, men í tólv ymiskum bólkum. Arbeiðið fevnir eitt nú um framtíðar almannaskipanir og framtíðar eldrarøkt, um virkisætlanir fyri børn og ung og fyri fólk við skerdum førleika, um bústaðarpolitiskan reform, um framtíðar heilsuverk og um fólkaheilsuætlanina, sigur landsstýrismaðurin á heimasíðuni hjá Visjón 2015.

### Farin til verka

Mánadagin 6. mars boðaði landsstýrismaðurin øllum, sum luttaka vælferðarvisjónini til fundar í ráðnum, har endamálið var at fáa gongd á arbeiðið í bólkunum. Nakrir av bólkunum høvdu skipað seg fyri fundin og eru tí komnir nakað áleiðis við arbeiðinum, at gera skrivligar frágreiðingar um ymisku økini.

Sambært Hans Paula Strøm, leiddi hann sjálvur fundin. Greitt varð frá arbeiðinum higartil og kunnað varð um arbeiðið frameftir. Miðað verður ímóti, at bólkarnir hava tilfarið klárt tann 1. mai at leggja fyri Visjónstorgið, sum er ein yvirskipaður bólkur, við umboðum úr teimum politisku flokkunum, frá kommunufeløgum og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Endamálið hjá visjónstorginum er at gera viðmerkingar til frágreiðingarnar, sum strategibólkarnir og vælferðarbólkarnir orða.

### Aðalmið

Sambært Almanna- og heilsumálaráðnum er visjónin um vælferð grundað á hesi aðalmið:

– Okkara fremstu almanna- og heilsupolitisku mál eru, at fólkið skal trívast, mennast og fjølgast í okkara landi. Hetta skal gerast við at tryggja øllum borgarum neyðugur umstøðar fyri góðum lívskorum í einum vælskipaðum vælferðarsamfelag, har sínámillum ábyrgdin millum borgaran og myndugleikan, eins væl og samhaldsfestið millum øll, verður sett í hásæti. Og víðari verður sagt, at sama, hvør sosiala og persónliga støða borgaranna er, skal teimum verða tryggjað rættindi og atgongd til munagóðar almanna- og heilsutænastur, sum vit hava neyðugan tørv á. Hetta setur støðug politisk krøv til áhaldandi innihaldsliga, bygnaðarliga og fíggjarliga menning av okkara vælferðarskipanum. Tí seta vit okkum mál og leggja ætlanir fram í tíðina.

## Visjónin um vælferð fevnir um:

### Vælferðarráð

Settur verður arbeiðsbólkur at skriva frágreiðing um, hvussu eitt vælferðarráð kann verða skipað, og um tess virksemi.

■ Helena Dam á Neystabø, leiðari, Føroya Skúlabókagrunnur
■ Gestur Hovgaard, samfelags-frøðingur
■ Randi Frederiksberg, sam-felagsfrøðingur
■ Rolf Guttesen, Cand. scient.

### Almanna- og heilsu-gransking

Ein arbeiðsbólkur verður settur at koma við einum uppskoti um, hvussu ein skipað gransking á almanna- og heilsuøkinum kann byggjast upp.

■ Jóanis Erik Køtlum, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Turid Arge, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Petra Joensen, stjóri, Alman-nastovan
■ Pál Weihe, yvirlækni, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu
■ Rúna Hilduberg, Granskingarráðið

### Framtíðar almannalóggávu

Ein arbeiðsbólkur skal koma við einum uppskoti til eina arbeiðsætlan um at endurskoða forsorgarlógina og aðra almannalóggávu á økinum.

■ Maria Jacobsen, deildarleiðari, Almannastovan
■ Eyðvør Mortensen, deildarleiðari, Almannastovan
■ Eyðun M. Hansen, deildar-stjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Eva Bennicke, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Marjun Kálvalíð, MBF

### Pensjónsreform

a) Sitandi arbeiðsbólkur undir Fíggjarmálaráðnum skal koma við einum uppskoti til eina framtíðar eftirlønarskipan. Bólkurin skal handa landsstýrismanninum álitið 1. mai 2006.

b) Í mai 2006 skal Almanna- og heilsumálaráðið seta ein arbeiðsbólk at koma við einum uppskoti til eina arbeiðsætlan fyri eini endurskoðan av øllum fyritíðarpensjónsøkinum.

c) At gera eitt upplegg til hetta arbeiðið verður nú settur ein fyrireikingarbólkur í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Marjun Berg, deildarleiðari, Almannastovan
■ Heri Petersen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Eyðun Mohr Hansen, Deildarleiðari, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Leila Solmunde, MBF
■ Umboð fyri Fíggjarmálaráðið

### Framtíðar eldrarøkt

Ein arbeiðsbólkur verður settur at arbeiða við einum uppriti at leggja fyri landsstýrið, um ætlaninar á eldraøkinum.

■ Ronnie Thomassen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Kristian Árnason, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Gunnleyg Durhuus, Heimarøktin og Serforsorgin
■ Sonja Klein, økisleiðari, Heimarøktin
Umboð fyri kommunufeløgini

### Virkisætlan fyri fólk við skerdum førleika

Við støði í teimum málum, sum eru sett og teimum trupulleikum/avbjóðingum, sum eru staðfest, skal ein arbeiðsbólkur leggja eina ætlan fyri, hvussu vit røkka málunum.

■ Hallbera F. West, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna, Ráðið fyri Brekað
■ Jóanes N. Dalsgaard, deildarleiðari, Heimarøktin og serforsorgin
■ Marjun Poulsen, leiðandi fysioterapeutur, Landssjúkrahúsið
■ Marjun Berg, deildarleiðari, Almannastovan
■ Palli Mortensen, deildarleiðari, Almannastovan

### Virkisætlan fyri børn og ung

Ein arbeiðsbólkur verður settur, sum skal gera eitt uppskot um eitt samanhangandi sosialpolitiskt útspæl á barna- og ungdómsøkinum.

■ Katrin Gaard, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Maibritt Simonsen, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Anna Dam, leiðari, Barnaverndarstovan
■ Oyvindur av Skari, Almanna-stovan
■ Minna Poulsen, varaleiðari, Heilsufrøðiskipanin
■ Doris Hansen, MBF

### Heildarpsykiatriska ætlan

Almanna- og heilsumálaráðið (Jan Simonsen, full-trúi, í samstarvi við psykiatriska depilin á landssjúkrahúsinum) arbeiðir við sálarsjúkuøkinum eftir ætlanini, sum liggur í álitinum um Heildarpsykiatri.

■ Lars Thostrup, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Tormóður Stóra, læknafakligur depilsleiðari, Landssjúkrahúsið
■ Regin Johansen, deildarleiðari, Heimarøktin og serforsorgin
■ Jan Simonsen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið

### Bústaðarpolitiskan reform

Samgonguflokkarnir hava samtykt eina bústaðarætlan, bústaðarpakkin. Almanna- og heilsumálaráðið ger ítøkiliga arbeiðsætlan fyri tey ymsu stigini í ætlanini.

■ Ronnie Thomassen, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Aibritt á Plógv, aðalstjóri
■ Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður

### Framtíðar heilsuverk

Settur verður ein skjótt-arbeiðandi arbeiðsbólkur at skriva frágreiðing um tað primera heilsuverkið, og hvussu hetta kann samskipast við tað sekundera heilsuverkið, við grundarlagi í áliti um framtíðar heilsuverk, sum ein arbeiðsbólkur í løtuni arbeiðir við.

■ Aibritt á Plógv, aðalstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Maria á Dul, starvsfólkaleiðari, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Birna Steingrímsdóttir, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Heðin Thomsen, yvirlækni
■ Jana H. Dalsgaard, Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar
■ Jákup N. Olsen, Sjúklingaráðið

### Framtíðar apoteksverk

Gera neyvari lýsing av hvussu apoteksverkið, herundir framleiðsla, søla og útbýtið av heilivági, fer fram í dag.

Heri Mørkøre, landsapotekari
■ Einar Magnússon, skrivstovustjóri í íslendska heilsu- og trygdarmálaráðnum
■ Birgit Vitalis Ottesen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið
■ Turid Arge, deildarstjóri, Almanna- og heilsumálaráðið

### Fólkaheilsuætlan

Við støði í teimum málum, sum eru sett og teimum trupulleikum/avbjóðingum, sum eru staðfest, skal ein arbeiðsbólkur leggja eina ætlan fyri, hvussu vit røkka málunum.

■ Katrin Gaard, fulltrúi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Birna Steingrímsdóttir, ráðgevi, Almanna- og heilsumálaráðið
■ Pál Weihe, yvirlækni, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu
■ Høgni Debes Joensen, landslækni
■ Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður